Ingilín Didriksen Strøm **Nr. 67/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um at samfelagið verður latið upp aftur, settur løgmanni Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Er politiska avgerðin um at lata samfelagið upp aftur í komandi viku tikin við støði í heilsufakligum tilmælum?
2. Ætlar løgmaður at koma við greiðari mannagongdum fyri, hvussu foreldur og námsfrøðingar og lærarar skulu fyrihalda seg, nú børnini fara aftur á stovn og í skúla?

Viðmerkingar
Shahin Gaini, yvirlækni, hevur bæði í donskum og føroyskum miðlum úttalað seg um, at hann við støði í heilsufakligum grundgevingum heldur tað vera skeivt at lata dagstovnar og skúlar upp aftur í komandi viku. Bjarni á Steig, yvirlækni, hevur somuleiðis boðað frá, at hann vónar, at fleiri halda børnini heima í eina tíð afturat.

Løgmaður hevur lagt avgerðina út til fólkið at taka, men hevur boðað frá, at samfelagið spakuliga letur upp aftur 20. apríl. Boðini frá heilsumyndugleikunum og frá landsstýrinum eru ymisk, og hetta skapar ótryggleika og stúran. Tá foreldur sjálv skulu gera av, um børnini fara aftur á stovn ella í skúla, kann tað seta fleiri í eina sera trupla støðu. Tey kunnu uppliva stúranir um børnini og smittuna, samstundis sum tey kunnu vera undir stórum trýsti frá arbeiðsgevarum, sum vænta tey aftur til arbeiðis sum skjótast.

Eisini námsfrøðingar hava boðað alment frá, at tey undrast á, at tey nú skulu til arbeiðis, tá heilsumyndugleikarnir mæla frá. Undirritaða heldur, at vit hava tørv á at fáa greitt at vita, hví landsins myndugleikar velja at lata skúlar og barnagarðar upp í komandi viku, og hvussu vit eiga at bera okkum at í hesum sambandi. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 14. apríl 2020

Ingilín Didriksen Strøm